# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt jaligt stig

Á ráðsfundinum seinasta fríggjadag samtyktu limalondini í FAO, at Føroyar fáa atlimaskap í felagsskapinum. Løgmaður fegnast sum vera man um atlimaskapin, sum fer at geva Føroyum ein virknan leiklut innan altjóða fiskivinnusamstarv. Harafturat gevur atlimaskapurin møguleikar fyri menningarvirksemi og samstarv innan menningarhjálp. Í FAO kunnu Føroyar koma við royndum og serkunnleika innan fiskuvinnu og aling, og harafturat gagnnýta og læra av holla virkseminum hjá FAO.

Vit eru mangan atfinningarsom mótvegis landsstýrinum og kanska serstakliga løgmanni, tað vil so vera, og tað er ein partur av okkara uppgávu sum óheftur miðil. Hinvegin er sjálvsagt, at vit fegnast og geva rós, tá eitt nú løgmaður fær góð úrslit, sum gagna allari tjóðini. Vit fara nú uppí eitt samstarv, har føroyingar kunnu verða partur av tí týdningarmikla arbeiðinum hjá FAO, um at tryggja burðardygga matvøruframleiðslu og veitan av matvørum kring heimin. FAO hevur ein týðandi leiklut innan altjóða fiskivinnusamstarv. Atlimaskapurin fer at geva Føroyum møguleika fyri at hava ein virknan leiklut og ávirkan innan hetta samstarv. Atlimaskapurin gevur eisini aðrar møguleikar fyri samstarv, eitt nú innan menningarhjálp.

Atlimskapurin í FAO er eitt jaligt stig og eitt diplomatiskt bragd, sum løgmaður og umsiting hansara í Tinganesi eiga at fáa mikið rós fyri. Tað er sjálvsagt, at vit við altjóðagerðini í huga royna at sleppa upp í allar viðkomandi altjóða samstarvsstovnar. Í hesum høpi er FAO upplagt hjá okkum sum matvøruframleiðandi tjóð. Her hava vit nakað at geva, og her fáa vit heilt víst nógv burturúr samstarvinum, so her eru allar góðar grundir at fegnast um eitt gott og jaligt úrslit av longum og drúgvum samráðingum.

**Sosialurin**

## So gjørdi Útvarpið drong til kvennkyn

**EDVARD Í SKORÐINI JOENSEN**
Sandavági



Sambært útvarpinum hjá almenna Kringvarpi Føroya spældu drongjornar bólt hetta vikuskiftið.

Í ítróttartíðindunum leygarkvøldið frættu vit um kapping, har bæði drongjornar og gentornar luttóku.

Eg veit væl, at nú fer onkur at koma við teirri viðmerking, at hetta er suðuroyarmál, og at vit eiga at verja hesi frávikini, sum nevnd verða dialektir.

Víst eiga vit at verja øll frávikini. Eg eri púra samdur. Men hatta er ikki suðuroyarmál. So mikið av suðuroyarmáli havi eg hoyrt alt mítt lív, at eg tori at halda upp á tað.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at málið verður mishandlað í almenna útvarpinum. Men heldur enn at seta krøv og bøta um ringa skilið, tykist leiðslan bara lata standa til og lata hvønn Hanus og Janus púra uttan treytir sleppa fram at mikrofonini og varpa hesar avskeplaðu máliskurnar út í luftina til Føroya fólk.

Tað, sum fólk hoyrir í útvarpi og lesur í bløðum, halda tey flestu ivaleyst vera rætt. Tey taka tað til sín og nýta aftur. At fremsti almenni mentanarberi landsins skal ganga undan í hesi útrudding av samleika okkara eigur ikki at standa óátalað. Tí tá málið er farið, er tjóðin farin. Málið er skjótt tað einasta, sum eftir er av okkum sum serstøk tjóð. Alheimsgerðin er skjótt farin við restini.

Ikki tí, at nakað ringt er í at fylgja við heiminum kring okkum. Tað er neyðugt, og tað eiga vit eisini at gera. Men at beina fyri málinum av ólíkindum og kleyvarskapi er ovboðið. Og tað fyri almennar pengar.

Dømini um vánaliga málkunnleika í Kringvarpinum eru mong. Eg skal bert nevna eitt, sum hevur verið at hoyrt hvørt leygarkvøld í heyst. Nevniliga hetta um forkunnuga vinningin í spurnarkappingini.

At nevna eina ferð við Atlantsflogi forkunnuga kann bert benda á, at tann, sum sigur so, veit ikki , hvat orðið forkunnugt merkir. Tað er okkurt, sum fæst sjáldan. Og tað kann so ikki sigast um ferðaseðlar frá Atlantsflogi.

Minsta krav vit eiga at kunna seta Kringvarpinum er, at starvsfólkið dugir føroysk mál.

## Ikki neyðugt hjá Edmundi at seta krøv!

**JOHAN PETERSEN**



**Aldargamla samstarvið millum Sambandsflokkin og Vinstra byggir ikki á krøv, men álit og virðing hvør fyri øðrum. Tí er tað púra óneyðugt at seta krøv til Vinstraflokkin fyri stuðulin, Sambandsflokkurin nú kann veita honum, so sum eitt nú Sosialurin mælir til í oddagrein**

Sosialurin ger í oddagrein nógv burtur úr, hvussu Edmund Joensen, nývaldi fólkatingslimurin hjá Sambandsflokkinum, eigur at seta krøv til Vinstraflokkin og Anders Fogh Rasmussen fyri stuðul sín til borgarligu stjórnina í Danmark.

**Loysingarsinnaður javnaðarmaður**

Hesi ráð í Sosialinum eru so burtur við, at tú kundi trúð, at tað var ein fornermaður, vónbrotin og loysingarsinnaður javnarmaður við Poul Nyrup Rasmussen í huganum, sum hevði skrivað tey. Men Sosialurin er jú ikki longur heftur at Javnaðarflokkinum!

**Sosialurin má hava etið bláseym**

Sosialurin mælir til, at Edmund skal krevja av donsku stjórnini, at hon skal syrgja fyri, at ES skal sleppa føringum upp í ávís samstørv, sum vit hava havt ynskir um og sum ikki eru komin í lag enn. Sosialurin má hava etið bláseym, tá ið hann kann finna upp á slíkt tvætl og pástanda, at ES hevur vent okkum bakið.

**Bert Sambandsflokkurin ynskir ES-samstarv**

Tað er júst Sambandsflokkurin og bert Sambandsflokkurin av øllum føroysku flokkunum, sum hevur mælt til samstarv við ES. Allir hinir flokkarnir venda jú ES bakið. At ES so ikki glaðbeint hoppar og dansar eftir førisku pípuni, tá vit fyri ein kortan bemerkning ynskja eitt samstarv, sum kann gagna okkum, er jú púra náttúrligt.

**Undirgrundarmálið og limaskapur í Norðurlandaráðnum hvør sítt**

Víðari samanber Sosialurin loysnina av undirgrundarmálinum við ynskið føroyinga um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Reint paranoia. Undirgrundarmálið var danskt málsøki og var tí upp til donsku stjórnina at avgreiða.

Danska stjórnin stuðlar jú føroyska ynskinum um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum, meðan tað eru hini norðanlondini, sum ikki vilja broyta Helsingforssáttmálan, soleiðis, at Føroyar kunnu gerast sjálstøðugur limur.

**Samstarv byggir á álit og virðing**

Nei, Sosialurin! Onki gott samstarv byggir á krevjaramentalitet. Gott samstarv byggir á álit og virðing hvør fyri øðrum. Tað hava Sambandsflokkurin og Vinstra. Tí er tað púra óneyðugt hjá Edmundi at seta nøkur krøv. Úrslitini koma náttúrliga og av sær sjálvum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.